## Donsk dubbing í Arktis

Danmark brynjar seg hernaðarliga í økinum við Norðpólin, soleiðis sum Kanada og Russland eisini ætla sær at gera. Berlingske Tidende skrivar, at allir flokkar á Fólkatingini við undantak av Eindarlistanum hava samtykt, at Danmark skal skipa eina serliga deild í tí arktiska økinum. Deildin skal so brúkast til átøk í Grønlandi ella til altjóða uppgávur í póløkinum, skrivar blaðið. Grønlendski landsstýrisformaðurin, Kuupik Kleist, sigur KNR, at Grønland hevur ongan áhuga í einari hernaðarligari dubbing í økinum, men um tað snýr seg um havumhvørvið og eftirlit, er ætlanin skilagóð, sigur hann.



## H1N1 fer at raka vinnulívið

Fáa tey rætt, sum siga, at fjórði hvør dani kann fáa H1N1, kann sjúkan kosta tí danska vinnulívinum fleiri milliardir krónur. Kanningar hjá danska arbeiðsgevarafelagnum vísa, at H1N1 kann elva til 2,1 milliónir fleiri sjúkradagar enn eitt vanligt ár, og tað fer at kosta 3,3 milliardir krónur, skrivar JyllandsPosturin. Ein talsmaður hjá danska ídnaðarfelagnum sigur, at sjúkan er búldur oman á sár, tí nógvar vinnufyritøkur hava longu stórar trupulleikar orsakað av fíggjarkreppuni. Talsmaðurin mælir øllum fyritøkunum til at leggja ætlanir um, hvat skal gerast, um sjúkan fer at breiða seg so nógv, sum summi vænta.



*Hans Pauli Strøm kundi roynt at fingið sær heimild til upphæddina, sum brúkt var ov nógv, sigur Torbjørn Jacobsen*

# Skil má vera á peninganýtsluni

**Hans Pauli Strøm kundi bara havt biðið um milliónirnar, sum hann brúkti ov nógv, sigur tingmaðurin Torbjørn Jacobsen. Hann vísir aftur, at hann ella onnur hava nakað persónligt móti fráfarna landsstýrismanninum**

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Spurnartekn verður sett við, hví landsstýrismálanevndin bara staðfesti meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni og ikki meirnýtsluna hjá øllum hinumlandsstýrisfólkunum, sum eisini hava brúkt meira, enn játtað var á fíggjarlógini.

Torbjørn Jacobsen, tingmaður sigur orsøkina vera ta einføldu, at í hesum førinum var meirnýtslan serliga grov. Landsgrannskoðarin tók málið upp, og fíggjarnevndin tað sama.

- Tað einasta, sum landsstýrismálanevndin gjørdi, var at staðfesta út frá somu tølum, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann heldur einki løgið vera í, at nevndin ikki hugdi at meirnýtsluni hjá øðrum landsstýrisfólkum, sum hava verið, tí tað tænir ongum endamáli at fara eftir fólkum, sum ikki longur eru landstýrisfólk. At Helena Dam á Neystabø verður nevnd í yvirlitinum yvir landsstýrisfólk, sum hava brúkt ov nógv, og nú aftur er landsstýrisfólk, hevur Torbjørn Jacobsen onga viðmerking til.

### Kundi fingið sær heimild

Hann vendir aftur tilat tosa um, hvussu stóra upphædd Hans Pauli Strøm sum landsstýrismaður brúkti meira, enn játtað var á fíggjarlóg og eykafíggjarlógum.

- Men var ikki ov lítið játtað til málsøki hansara?

- Tað kann gott vera, men vit mugu minnast til, at eingin landsstýrismaður hevur meira pening, enn játtaður er á fíggjarlógini. Henda meirnýtslan er út yvir fíggarlóg og eykajáttanarlógir. Hans Pauli Strøm gjørdi onga roynd at biðja um hasa upphæddina, sigur Torbjørn Jacobsen, sum skýrir Hans Paula Strøm fyri at vera arrogantan, tá ið hann av tingsins røðarapalli segði, at løgingið kundi gloyma alt um sparingar á hansara øki.

Torbjørn Jacobsen vísir aftur, at hann hevur nakað persónligt móti Hans Paula Strøm.

- Hetta er ikki nakað persónligt. Tað snýr seg bara um disiplin, tí landssýrisfólkini mugu hava heimild til peningin, sum brúktur verður, sigur Torbjørn Jacobsen.

# Svíður hjá pensionistunum

**Nú pensionistar fáa minni stuðul til heilivág frá sjúkrakassunum, kann vandi vera fyri, at summi fara at gevast við at taka neyðugan heilivág, heldur Sigvald Kristiansen, formaður í Landsfelag Pensionistanna**

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



1. juli gjørdist tað enn dýrari at vera pensionistur í Føroyum. Tá komu í gildi nýggjar kunngerðir um, at stuðlin frá sjúkrakassunum til pensionistar minkar í sambandi við keyp av heilivági.

Frammanundan skuldu pensionistarnir gjalda tær fyrstu 200 krónurnar um ársfjórðingin sjálvir, men nú skulu teir gjalda fyrstu 400 krónurnar.

Pensionistar, sum hava inntøku høgri enn fulla fólkapensión og frá Samhaldsfasta, skulu gjalda tær fyrstu 600 krónurnar um ársfjórðingin sjálvir.

Pensionistar hava frammanundan lítið at liva av, og tí svíður henda broytingin.

- Hetta er ógvuliga keðiligt, og tað rakar meint hjá pensionistum, sum hava varðandi sjúkur at stríðast við, sigur Sgvald Kristiansen, formaður í Landsfelag Pensionistanna.

Hann hugsar um fólk við gikta- ella hjartasjúkum, fólk vi sukursjúku, ella tey hava ov høgt blóðtrýst.

- Enn hava vit ikki hoyrt so nógv frá pensionistum um hetta, men broytingin er eisini so nýliga gjørd, sigur Sigvald Kristiansen.

## Stóra ávirkan

Hann ivast ikki í, at broytingin fer at merkjast, tí í mun til inntøkuna hava pensionistar nógvar útreiðslur hvønn mánað at gjalda.

- Av tí at tey sita so hart í tí, er vandi fyri, at summir pensionistar fara at gevast at taka neyðugan heilivág, ið tey mugu taka fyri at halda sjúkum niðri, og tað kann vera vandamikið, sigur Sigvald Kristiansen.

Landsfelag Pensionistanna fekk uppskotið til kunngerðina til hoyringar, og felagið mótmælti, men tað hevði onga ávirkan. Avgerðin var tikin.